# søgur

**EGYPTALAND:**

**Høvuðsstaður:** Cairo
**Mál:** Arabiskt
**Átrúnaður:** 90% muslimar og 10% kristin
**Stødd:** 1.001.450 km2 harav 0,6 prosent vatn.
**Fólkatal:** 80.300.000
**Gjaldoyra:** 1,00 egyptisk pund er uml. 0,95 d.dk.
**Veðurlag:** Heitt og turt. Regnar ongantíð. Kalt um náttina.
**Politiskt:** Hosni Mubarak er forsætisráðharri. Landið varð lýst í undantaksstøðu í 1981 og er hetta framvegis galdandi. Lýðveldi.



*Úr grøvini hjá Tut-Ankh-Amon í Konganna dali. Kendi gullskorturin hjá dreingjakonginum var millum dýrgripirnar, sum fornfrøðingar komu fram á í 1922. Balsameraða líkið av dreingjakonginum liggur nú í einari glasmontru inni í grøvini, har ferðafólk eisini hava atgongd*



*Myndir og hieroglyffir eru meiðslað inn í sandstein alla staðni. Her Sára Maria undir einari súlu í einum 2000 ára gomlum templi*

*Myndaevnið á loftinum í gravkamarinum hjá konginum Seti 1 í Konganna Dali í Luxor*



*Vit síggja næstan ongin lokal konufólk. Tænarar og onnur í ferðavinnuni eru øll mannfólk. Her undirheldur eitt orkestur við lokalum tónleiki*



økið kring Svartahavið eisini staðið. Men so upplivir tú ikki upprunaligu mentanini úr gamla Egyptalandi, sum milliónatals ferðafólk úr øllum heiminum leita sær til á hvørjum ári.

**Aladdin millum jól og pyramidur**

Vit valdu eina 15 daga Kefren-rundferð frá donsku ferðastovuni Atlantis Rejser. Fyrra vikan var eitt sonevnt Nilcruise, har vit sigldu niðan eftir Nilá í einum cruiseskipi við fýra dekkum, harav ovasta dekkið var sóldekk við svimjihyli og liggistólum. Á ferðini løgdu vit at í ymsum býum, har eitthvørt áhugavert var at síggja. Vit høvdu longu heimanífrá teknað okkum til allar útferðirnar, har ein sera dugnaligur og vælútbúgvin danskur ferðaleiðari vísti runt. Eitt nú løgdu vit at í fyrrverandi Theben, sum í dag eitur Luxor, har vit vitjaðu Konganna Dal og Karnaktemplið og annað har íkring. Vit vóru við segl-báti, á kamelbaki og í hestavogni. Í Sahara oyðimørkini, hjá teppiseljaranum Aladdin, á krokodillufarmi og í papyrushúsi. Eisini komu vit heilt suður móti markinum til Sudan, har Aswanbyrgingin hevur tamt risastóru ánna, sum í øldir hevur verið lívsæðrin í landinum, bæði sum vatnkelda hjá landbúnaðinum og sum flutningsvegur.

Seinnu vikuna býttu vit sundur, so vit fingu tríggjar dagar í Keiro, har vit vitjaðu egyptiska fornminnissavnið, Museum of Egypt, við øllum dýrgripunum frá fornari tíð. Eisini løgdu vit leiðina framvið Giza-sléttanum, har pyramidurnar og sfinxurin lokkaðu. Her var tað serliga spennandi hjá børnunum at sleppa inn í tað allar heilagasta í heimsins størstu pyramidu, Keops. Meðan børnini lupu upp gjøgnum trappurnar fór pápin krúpandi aftaná – ikki er lætt at vera 186 cm høgur og krúpa í 1 metra hædd teir 70 metrarnar eftir smølum trappum í myrkri, nógvum hita og við lítlari luft. Gott, at mamman bíðaði uttanfyri.

Síðstu fýra dagarnar var sólferia á einum góðum hotelli í Luxor, har allar tær mongu spennandi upplivingarnar sluppu at festa seg. Egyptaland er kolandi heitt á sumri, í miðal eini 40 stig. Desember er næstkaldastur við 25 stigum í miðal – perfekt!

Jólaaftan var millum hesar seinastu fýra dagarnar, og tað var bara hugna-ligt at halda bretsk jól á einum fínum hotelli saman við fólki úr øllum